# Tveir føroyingar við í AaB sigri í Ísrael



Jón Rói var alla tíðina í miðverjuni, og síðsta korterið var Súni Olsen á vøllinum, tá ið AaB í kvøld vann 3-1 í Tel Aviv. Tað er gott lag í AaB ferðalagnum, sum nú er komið heim til Danmarkar. AaB hevur í gjárkvøldið spælt á útivølli ímóti Hapoel Tel Aviv, og føroyska útisetaliðið vann 3-1. Jón Rói Jacobsen var í AaB miðverjuni allar 90 minuttirnar, og tá ið tað restaðu knappliga eitt korter, varð Súni Olsen skiftur inn. AaB legði seg á odda í 27. minutti, og tað kom sera illa við, tá ið heimaliðið í yvirtíðini í 1. hálvleiki javnaði. Beinanvegin eftir hvíldina skoraði AaB aftur. Hesa ferð var tað við brotssparki. Miðskeiðis í 2. hálvleiki økti AaB til 3-1, og so var tað avgjørt, at Jón Rói, Súni og liðfelagarnir skuldu vinna fulla úrtøku. AaB fer nú í vetrarfrí eftir framúr heysthálvu. AaB er eftir 18 umfør oddalið í superliguni, og eftir fín úrslit í Intertoto Cup eydnaðist tað at røkka langt í UEFA Cup, eitt nú við samantaldum sigri á italska Sampdoria.

# Tvær ferðir Kyndil

**Bæði hjá kvinnum og monnum gjørdi Kyndil bart, tá talan var um sigrar á Neistanum, hóast tað kanska var klistrað eitt lítið favoritmerki á Neistaliðini**



*Kyndlaverjan stóð væl tá tær høvdu vitjan av Neistanum*

*savnsmynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Hóast Neistin eigur ovaru liðini á stigatalvuni, so var tað Kyndil, sum bookaði sær atgongumerki til hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini í hondbólti.

Bæði kvinnur og menn vunnu nevnliga á bláu favorittunum í gjárkvøldið.

Hjá kvinnunum endurtók Kyndil sigurin í landskappingini. Hesa ferð við 29-24, og eins og fyri trimum vikum síðani, so var uppskriftin hart arbeiði og stríðsvilji.

Tað var tað eisini hjá Kyndilsmonnum, sum vunnu sín dyst 35-30. Har leikaði leingi javnt á, men í seinna hálvleiki togaði Kyndil seg frá Neistanum.

### Ójavnt kappingarár

Mansliðið hjá Kyndli hevur havt eitt sera trilvandi kappingarár higartil, men í gjárkvøldið vunnu teir so fyri aðru ferð móti bláu grannunum, so kanska hetta er ein ábending um at Kyndlaliðið er við at rakna við aftur. Livst so spyrst.

Kyndil liggur á einum fimta plássi og hevur 8 stig fyri 11 dystir, heili 7 stig upp til annað finaluplássið, ið Neistin liggur á í løtuni, við 15 stigum.

Næsti dystur hjá teimum grønu verður 19. januar, og tá verður tað gamli arvafigginidinVÍF, ið kemur á vitjan. VÍF liggur í løtuni á einum fjórða plássi við 11 stigum, og uttan iva verða vestmenningar rættuliga uppsettir at vaska lemjandi ósigurin í gjárkvøldið av sær.

### Kvinnurnar kempa

Kvinnuliðið hjá Kyndli, hevur eins og mansliðið havt eitt sera ójavnt kappingarár, og higartil hava tær vunnið sær 7 stig fyri 11 dystir. Tær liggja á einum fimta plássi í Sunsetkappingini, og eins og hjá monnunum eru tað sjey stig upp til annað finaluplássið. Tað situr Neistin á við 14 stigum fyri 9 dystir, so tað er ein fittligur teinur upp til finaluna, og um Kyndil skal náa hesum, mugu tær byrja at vinna sær nakrar dystir. Fyrsti møguleikin tær fáa, verður 19. januar, tá – eins og hjá monnunum- VÍF kemur a vitjan.

## FAKTA

**Dysturin í tølum:**
**Kyndil-Neistin (kvinnur) 29-24 (13-10)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 7, Jacklyn Djurhuus 7 (2), Tordis Tróndarsson 5, Randi Wardum 5 (2), Ronja Mikkelsen 3 (1), Barbara Egilstrøð 1, Hildur Høghamar 1, Bjørg Syderbø 1.
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 8 (2), Ása á Neystabø 6 (2), Anja Heinadóttir 4, Elin Staksund 2, Rakul Augustinussen 2, Katrin á Neystabø 1, Ása Christiansen 1.
**Brotskøst:** Kyndil 6, Neistin 6
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistin 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

## FAKTA

**Dysturin í tølum:**
**Kyndil-Neistin (menn) 35-30 (17-15)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Finnur Hansson 12, Josef Abrahamsen 6 (2), Hans Áki D. Christiansen 4 (1), Hjalti Jacobsen 4, Hanus Johansen 4, Janus E. Sørensen 3, Ken Zachariasen 1, Rani Ellingsgaard 1.
**Neistin:** Karl Herup Olsen 6, Roar Dalsgarð 6, Áki Mørk 4 (1), Tróndur Kragesteen 4, Dann Torleivson 4, Ljugoslav Djumic 3, Karl O. Rasmussen 2, Johan Brekstein 1.
**Brotskøst:** Kyndil 4, Neistin 1
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 5
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

# Heðin skilir Elspu

**Vónin er enn til staðar. Men tað verður hvørki í dag ella í morgin, at Føroyar fáa olympiskan limaskap, sigur ÍSF-forsetin**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyskur ítróttur veittrar farvæl til ein av fremstu einstaklingum okkara, nú Elspa Mørkøre hevur gjørt at fara á danska svimjilandsliðið.

Høvuðsorsøkina til hetta sigur Elspa verða møguleikin at kappast í OL í 2012. Ein møguleiki, sum Føroyar ikki kunnu bjóða henni í dag.

Olympiskur limaskapur er tó nakað, sum ÍSF hevur arbeitt við í longri tíð. Men hóast vónin um hendan ikki er slept enn, so sigur ÍSF-forsetin seg skilja avgerðina hjá Elspu Mørkøre.

- Í útgangsstøðinum eru treytirnar hjá IOC (altjóða olympisku nevndini), at tú skalt vera sjálvstøðugur limur í ST, um tú skalt fáa olympiskan limaskap. Tað eru vit ikki, men vit hava so eina umsókn liggjandi, sum varð send inn eftir gomlu upptøkutreytunum. Tað sama hevur Gibraltar, og í seinastu longu tíðina hava vit bíðað eftir útfallinum av stevningini, sum Gibraltar hevur latið IOC. Vinnur teirra umsókn frama, ger okkara tað helst eisini, sigur Heðin Mortensen, ÍSF-forseti.

Hann leggur tó dent á, at skuldu Føroyar blivið sjálvstøðug tjóð, so er hetta heldur eingin trygd fyri, at vit kunnu fáa altjóða limaskap.

- Verandi umsóknin er helst einasti møguleiki, sum vit hava. Í dag er støðan tann, at IOC als ikki er serliga fegið um at fáa fleiri smátjóðir sum limir. Og tí er spurningurin, um vit í dag høvdu havt nakran møguleika, hóast kravið um ST-limaskap verður lokið. Í so máta er IOC ein væl meira stongdur felagsskapur enn so nógvir aðrir. Flestu sersambond okkara kunnu jú kappast til bæði HM og aðrar kappingar. Men til OL sleppa vit altso ikki í verandi støðu.

### Skilir Elspu

Og í ítøkiliga døminum um Elspu Mørkøre sigur Heðin Mortensen, at hann sum so væl skilir avgerðina.

- Fyrst og fremst, so er tað ein persónlig avgerð, sum Elspa hevur tikið. Og tí er tað ikki avgerandi, um vit onnur eru samd ella ikki. Men hon sigur seg hava ein dreym um at kappast til OL, og tað er nakað, sum Føroyar ikki kunnu bjóða henni í verandi støðu. Og hóast vit enn hava vónina um, at vit kunnu fáa IOC-limaskap, so verður tað hvørki í dag ella í morgin. Og ein svimjari kann jú ikki bíða í óavmarkað ármál eftir hesum møguleikanum.

- Og sjálvandi ynskja vit henni alt tað besta. Tað vildi verið stuttligt, um hon í framtíðini megnar at svimja seg heilt fram í oddin, men samstundis vil tað verða ein løgin kensla, um vit síggja ein føroying á olympiska pallinum umboðandi Dannebrog og ikki Merkið, sigur Heðin.



*Heðin Mortensen*
*Olympiskur limaskapur hevur leingi verið eitt hjartamál hjá Heðini Mortensen. Men enn er hesin ikki komin, og sum hann tekur til sjálvur, so verður tað hvørki í dag ella í morgin, at hetta verður veruleiki*